BUM.FO



# Tín meining hevur týdning

# Barnarættinda-sáttmálin



**Barnarættindasáttmálin – tíni rættindi.**

Ein stytt útgáva / Kelda: www.snar.fo

Grein 1

### Hvat er eitt barn

Tú ert eitt barn, um tú ert undir 18 ár.

Grein 2

### Javnrættindi og verja móti mannamuni

Tú hevur rættindi – sama hvussu tú sært út, hvat tú trýrt uppá, og hvaðan tú kemur.

Grein 3

### Tryggja áhugamálini hjá børnum

Vaksin skulu gera tað, sum er best fyri børn.

Grein 4

### Barnarættindasáttmálin skal haldast

Vaksin skulu halda tað, sum stendur í Barnarættinda-sáttmálanum.

Grein 5

### Leiðbeining av foreldrum

Foreldur tíni skulu ansa væl eftir tær. Duga tey ikki tað, skulu tey hava hjálp til tað.

Grein 6

### Rætturin til lívið

Tú hevur rætt at liva – og tað landið, sum tú býrt í, skal hjálpa tær við at hava eitt gott lív.

# Barnarættinda-sáttmálin

Grein 7

## Navn og tjóðskapur

Tú hevur rætt til at hava eitt navn og eitt heimland – og til at kenna foreldur tíni, líka frá tú ert fødd/føddur.

Grein 8

## Samleiki

Landið skal tryggja, at øll børn hava eitt heimland, eitt navn og eina familju.

Grein 9

## Barnaverja

Tú hevur rætt til at búgva saman við tínum foreldrum, um tú hevur tað gott hjá teimum. Um ikki, skulu myndugleikarnir hjálpa tær at finna eitt annað stað, har tú kanst búgva.

Grein 10

## Familjusameining

Tú hevur rætt at liva saman við tínum foreldrum, sama hvørjum landi tey búgva í.

Grein 11

## Barnaræning

Lond, sum hava skrivað undir Barnarættindasáttmálan, skulu forða fyri, at børn verða rænd og flutt í onnur lond.

Grein 12

## Rætturin at siga sína hugsan

Tú hevur rætt til at hava tína egnu meining, og tey vaksnu skulu virða hana.

# BARNARÆTTINDA-SÁTTMÁLIN

GREIN 13

## FRÆLSI TIL AT GREIÐA FRÁ OG FÁA UPPLÝSINGAR

Tú hevur rætt at siga, tað tú meinar, um tú ikki ger teg inn á rættindi hjá øðrum. Tú hevur rætt til at leita eftir, fáa og lata upplýsingar og vitan frá sær.

GREIN 14

## TRÚARFRÆLSI

Tú hevur rætt til sjálv/ur at avgera, um tú vilt trúgva á ein gud – og hvønn gud tú vilt trúgva á. Tú kanst liva eftir tíni trúgv, so leingi tú ikki gert teg inn á rættindi hjá øðrum.

GREIN 15

## FELAGSFRÆLSI

Tú hevur rætt til at vera við í einum felagi. Tú kanst eisini stovna títt egna felag, so leingi tú ikki gert teg inn á rættindi hjá øðrum.

GREIN 16

## VERJA AV PRIVATLÍVI

Tú hevur rætt til privatlív. Til dømis mugu onnur ikki lesa tíni sms, boð, teldupost o.s.fr.

GREIN 17

## UPPLÝSING FRÁ FJØLMIÐLUM

Tú hevur rætt at vita, hvat hendir í verðini – t.e. at hava atgongd til internet, sjónvarp, útvarp, bløð og bøkur.

GREIN 18

## BARNAUPPALING

Foreldur tíni hava høvuðsábyrgdina av at uppala og menna teg.

# Barnarættinda-sáttmálin



### Grein 19
## Verja móti harðskapi
Myndugleikarnir skulu verja teg, um tú ert fyri harðskapi, happing ella aðrari ringari viðferð.

### Grein 20
## Foreldraleys børn
Myndugleikarnir skulu hjálpa børnum, sum ikki hava foreldur.

### Grein 21
## Ættleiðing
Landið skal tryggja, at eitt barn bara verður ættleitt, um tað er gott fyri barnið.

### Grein 22
## Flóttabørn
Londini, sum hava undirskrivað Barnarættindasáttmálan, skulu tryggja, at flóttabørn fáa tað gott, og tey skulu samstarva við felagsskapir *(t.d. Reyða Kross, Læknar Uttan Landamørk og onnur) um tað.*

### Grein 23
## Børn, sum bera brek
Um tú bert brek, hevur tú rætt til at fáa hjálp við at menna teg og fáa eitt gott lív.

### Grein 24
## Heilsa
Tú hevur rætt til at liva gott og sunt og fáa læknahjálp, um tú verður sjúk/ur.

# BARNARÆTTINDA-SÁTTMÁLIN




GREIN 25

## Regluligt kanning av viðurskiftum hjá børnum á stovni

Landið skal syrgja fyri, at børn á stovnum hava tað gott.

GREIN 26

## Almannahjálp

Tú hevur rætt til almannahjálp, t.e. hjálp og stuðul frá myndugleikunum, um tú ikki kanst klára teg sjálvan.

GREIN 27

## Lívskor

Foreldur tíni skulu syrgja fyri, at tú fært mat, hita, tryggleika, lærdóm og kærleika, soleiðis at tú kanst menna teg. Um tey ikki megna tað, skulu myndugleikarnir hjálpa tær.

GREIN 28

## Undirvísing

Tú hevur rætt til ókeypis skúlagongd, og skúlin skal fara væl við tær.

GREIN 29

## Endamálið við undirvísingini

Tú hevur rætt til ein góðan skúla, sum gevur tær neyðuga vitan og mennir teg sum menniskja.

GREIN 30

## Minnilutar

Kemur tú frá einum minniluta, hevur tú rætt til at hava tína egnu mentan, trúgv og mál.

# Barnarættinda-sáttmálin



### Grein 31
## Hvíld og frítíð

Tú hevur rætt til at hava frítíð og tíð til at spæla og loyvi at luttaka í mentanarligum og skapandi virksemi.

### Grein 32
## Barnaarbeiði

Tú skalt verjast fyri hørðum og vandamiklum arbeiði, sum kann skaða tína heilsu og skúlagongd. Landið, har tú býrt, skal hava lóggáu, sum sigur, hvussu gamal tú mást vera, áðrenn tú kanst arbeiða.

### Grein 33
## Misnýtsla av rúseitri

Tú skalt verjast fyri nýtslu av rúseitri, og fyri at arbeiða við og selja slík evni.

### Grein 34
## Kynslig misnýtsla

Tú skalt verjast fyri allari kynsligari misnýtslu, undir hesum at selja teg sjálvan og at vera við í pornografiskum sýningum og tilfari.

### Grein 35
## Rán og søla av børnum

Landið skal forða fyri, at børn verða rænd og seld.

### Grein 36
## Onnur misnýtsla av børnum

Øll børn skulu verða vard fyri øllum sløgum av misnýtslu.

# Barnarættinda-
# sáttmálin



### Grein 37
## Píning og revsing
Tú mást ikki verða pínd/ur, og tú skalt hava góða viðgerð, um tú ert í fongsli.

### Grein 38
## Kríggj og stríð
Tú skalt verjast fyri kríggi og stríði, og tú mást ikki vera hermaður.

### Grein 39
## Endurmenning
Landið skal hjálpa børnum, sum hava verið fyri vanrøkt, misnýtslu ella píning.

### Grein 40
## Viðferð í rættarmálum
Landið skal hjálpa børnum, sum hava brotið lógina, í staðin fyri at revsa tey.

### Grein 41
## Til barnsins besta
Hevur landið eina lóg, sum gevur børnum betri rættindi enn tað, sum stendur í Barnarættindasáttmálanum, so skal tann lógin verða nýtt í staðin.

### Grein 42 – 54
## Kunning um Barnarættinda-sáttmálan
Landið skal uppá ymsar mátar syrgja fyri, at øll børn og vaksin læra um Barnarættindasáttmálan, og at hann verður hildin og virdur.